LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 17. november 2023
J.Nr.: LUM-16- 23/05602-39
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um
vørugjaldið, ið Tórshavnar havn krevur í sambandi við innflyting av ammoniumnitrati.

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vørugjaldið, ið Tórshavnar havn hevur kravt fyri innflutning av ammoniumnitrat. Vísandi til ivasama grundarlagið fyri at flokka ammoniumnitrat í vørubólkin um spreingievni, og at tað sambært Arbeiðs- og brunaeftirlitinum ikki var talan um spreingievni, mælti umboðsmaðurin Havnanevndini/Tórshavnar kommunu til at endurskoða gjaldsskránna og vøruskránna við atliti at vørugjaldinum fyri ammoniumnitrati.*

## 2. Málslýsing

Tann 24. februar 2023 sendi A, advokatur, klagu vegna B um kæruavgerðina, sum Havnanevndin/Havnastýrið fyri Tórshavnar Havn hevði tikið um gjaldið, sum Tórshavnar havn hevði kravt av teirra innflutningi av ammoniumnitrat. Klagan (við nágreining frá 1. mars 2023) var soljóðandi:

> "Klagan snýr seg um tað, sum eg havi víst á í kæruni til Havnastýrið, te. at Tórshavnar havn viðgerð ikki allar borgarar eins, tá tað snýr seg um vørugjald av vørum, sum verða fluttar inn um Tórshavnar havn.
>
> Tað verður eisini klagað um, at ammonium nitrat er klassifiserað sum vørubólkur 4604 "Spreingievni, dynamitt." Ammonium nitrat er ikki spreingievni og eigur at verða undir vørubólki 4901 "Taðevni, salpetur o.t."
>
> Sambært kærdu avgerðini, sum er viðfest, klassifiserar Tórshavnar havn ammonium nitrat undir vørubólk 4604 "Spreingievni, dynamitt" og eisini undir vørubólk 4901 "Taðevni, salpetur o.t."
>
> Meginreglan um, at borgarar skulu viðgerðast eins og fáa somu sømdir (lighedsgrundsætningen) verður sett til viks av Tórshavnar havn, tá tað snýr seg um innflutning av ammonium nitrat.

> Ammonium nitatrat, sum klientur mín innflytir, verður viðgjørt sum vørubólkur 4604 “Spreingievni, dynamitt.”. Ammonium nitrat sum bøndir og onnur innflyta verður viðgjørt sum vørubólkur 4901 “Taðevni, salpetur o.t.”
>
> Tórshavnar havn krevur, at mín klientur rindar 25 kr. pr. kg. av innfluttum ammonium nitrat. Bøndur og onnur, sum innflyta ammonium nitrat til gjødning, rinda 3 kr. pr. kg. av innfluttum ammonium nitrat. “

Málið byrjaði við soljóðandi skrivi, dagfest 9. desember 2021, sum B sendi til Tórshavnar Havn:

> “Vit eru komin eftir, at tit ígjøgnum longri tíð av órøttum hava kravt ov nógv í vørugjaldi fyri tøð, sum vit hava innflutt.
>
> Vørugjald fyri tøð er 30 kr. pr. tons. Tað er fastur prísur, sum tit og eisini aðrar havnir taka í vørugjaldi fyri tøð.
>
> Allar aðrar fyritøkur enn vit, sum innflyta tøð umvegis Tórshavnar havn, rinda 30 kr. pr. tons í vørugjaldi.
>
> Tit hava kravt okkum eftir 250 kr. pr. tons í longri tíð. Tað vil siga, at tit hava av órøttum kravt okkum eftir 220 kr. pr. tons ov nógv. ...
>
> Sambært kunngerðini um vørugjald, sum var galdandi fram til tann 4. apríl 2000, var vørugjaldið fyri tøð 2 kr. pr. 100 kg sum svarar til 20 kr. pr. tons.
>
> Vørugjaldið er síðani tá hækkað við 50 % til 30 kr. pr. tons. Tað er til at fyrihalda seg til, men tað er ikki rímiligt, at vørugjaldið fyri ein einstakan kunda er hækkað til 250 kr. Tað er ein hækking á 1.100 %.
>
> Sum almennur kommunalur stovnur kann Tórshavnar havn ikki loyva sær at viðgera kundar, sum innflyta somu vøru, ymiskt og krevja ymiskt vørugjald fyri somu vøru. Tað er ein munur á 220 kr. pr. tons í vørugjaldi, sum svarar til, at vit gjalda 733 % meira enn aðrar fyritøkur fyri at innflyta tøð.
>
> Vit eiga og skulu fáa somu sømdir sum aðrar fyritøkur.
>
> Tað eigur at siga seg sjálvt, at tað skal verða sama vørugjald fyri somu vøru.
> Fyri flutning, umsiting og vørugjald hevur tað ongan týdning, hvat vit gera við vøruna, tá vøran er komin inn um bryggjukantin, ella hvat fyri virksemi vøran verður nýtt til í síðsta enda. ...”

Tann 18. januar 2022 svaraði Tórshavnar Havn:

> “ ... Tað skilst, at tú við tøð meinar við tykkara innflutning av ammoniumnitrat yvir 16%.

Býráðið hevur ásett eina gjaldskrá fyri virksemi hjá Tórshavnar havn, har m.a. vørugjøld eru ásett. Í hesi gjaldskrá, sum seinast er regulerað í 2009, er ásett gjøld fyri teir ymisku bólkarnar, herundir spreingievnir, skotvápn v.m. Gjaldskráin er uppbygd eftir sama leisti sum gamla kunngerðin um havnagjøld, ið var avtikin fyri nógvum árum síðani, og takstirnir eru í stóran mun óbroyttir.

Tórshavnar havn hevur gjørt eina neyva flokking fyri tær ymisku vørurnar, sum koma til landi eftir hesari takstskipan. Tórshavnar havn hevur í nógv ár flokkað ammoniumnitrat yvir 16% sum spreingievni, og allir innflytarar hava rindað vørugjald samsvarandi hesum. Harumframt skal viðmerkjast, at ammoniumnitrat yvir 16% av myndugleikunum er flokkað sum spreingievni, og krevur serligt loyvi fyri at innflyta og selja.

Sum tað er upplýst fyri okkum verður tykkara innflutningur av ammoniumnitrat yvir 16% nýttur til spreingievni, og tit selja ikki tøð.

Um tit eru ónøgdir við at tykkara innflutningur av ammoniumnitrat yvir 16% er flokkað sum spreingievni, kunnu tit kæra hendan spurningin til Havnastýrið. ...”

Tann 25. apríl 2022 sendi klagarin hesa kæru til Havnastýrið fyri Tórshavnar Havn/Havnanevndina :

“

Kravið hjá mínum klient er, at hann fær júst somu sømdir sum onnur frá Tórshavnar Havn. Í hesum ítøkliga málinum snýr tað seg um, at vørugjaldið fyri innflutning av ammonium nitrat er 3 kr. pr. kg.

Mín klientur innflytir ammonium nitrat, sum er í sekkum, sum víst a viðløgdu myndum. Ammonium nitrat er nitratsalt við kemiska formlinum NH4N3 (4 og 3 lítið ella niður) og kann brúkast til ymiskt endamál. Mest vanliga verður ammonium nitrat brúkt sum tilsetningsevni til tøð (taðevni) og til spreingievni.

Tað krevur ikki serligt loyvi at innflyta ammonium nitrat. Vøra við ammonium nitrat verður heldur ikki innflutt á serligan hátt. Ammonium nitrat er ikki spreingievni og verður ikki klassifiserða sum vandamikil vøra. Ammonium nitrat verður eisini innflutt av bóndum og øðrum føroyskum fyritøkum enn mínum klienti.

Mín klientur er komin eftir, at hann fær ikki somu sømdir sum aðrar fyritøkur og hansara kappingarneytar. Mín klientur verður av Tórshavnar Havn kravdur eftir 25. kr. pr. kg. av ammonium nitrat, meðan aðrar fyritøku skulu gjalda 3. kr. pr. kg. Tað vil siga, at mín klientur skal gjalda meira enn 8 ferðir so nógv fyri somu vøru.

Ammonium nitrat, sum klientur mín innflytur, er ikki spreingievni. Tað ammonium nitrat er júst tað sama sum bøndir og aðrar fyritøkur innflyta. Har er eingin munur. Tí skulu fyritøkurnar ikki viðgerast ymiskt av einum almennum myndugleika sum Tórshavnar havn. Fyritøkurnar skulu ikki rinda ymiskt vørugjald fyri somu vøru.

Tórshavnar havn hevur í viðfesta mailsamskifti víst á, at mín klientur framleiðir spreingievni og at ammonium nitrat verður brúkt í spreingievnisframleiðsluni. Tað skal sambært Tórshavnar havn verða grundarlag fyri at krevja mín klient eftir vørugjaldi á 25 kr. pr. kg í staðin fyri 3 kr. pr. kg. Ammonium nitrat er nevnt í vøruskránni sum vøru nr, 4606. Tað evni er nevnt í vøruskránni sum vøru nr. 4901.

Tað er ikki relevant um innihaldið av nitrat (nitrogen) er niðanfyri ella omanfyri 16 %. Tøð hava vanliga hægri nitrat (nitrogen) innihald enn tað. Tað framgongur m.a. av viðfestu vørulýsing av tøð, har innihaldið av ammonium nitrat er 21 %. Býtið av evnum, herundir nitrat (nitrogen), verður m.a. lýst á https://www.thespruce.com/what-does-npk-mean-for-a-fertilizer-2131094.

Tað er ikki rætt av Tórshavnar havn at krevja, at mín klientur skal rinda meira enn 8 ferðir so høgt vørugjald sum aðrir innflytarar fyri somu vøru. Støðið má takast í vøruni sjálvari, og ikki hvat vøran møguliga skal nýtast til ella gerast partur av seinni, og um tað verður til tøð ella spreingievni. Soleiðis verður tað altíð og í øllum øðrum førum gjørt ”

Avgerðin frá Havnanevndini frá 26. september 2022 var soljóðandi:

“Nú er klaga tygara um vørugjald á Ammonium Nitrat viðgjørd í Havnanevndini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Gjaldskrá fyri Tórshavnar havn, dagfest 1. juli 2009.
- Kunngerð nr. 45 frá 4. apríl 2000 um avtøku av kunngerð um skipa- og vørugjøld fyri havnir og bryggjur.

*(Fram til ár 2000 var tað Føroya Landsstýri, sum við kunngerð ásetti skipa- og vørugjøld fyri allar føroyskar havnir. Seinasta kunngerðin um vørugjøld varð sett úr gildi við omanfyrinevndu kunngerð. Myndugleikin at áseta skipa- og vørugjøld liggur hereftir hjá kommununum/havnunum).*

- Heimildarskipan Tórshavnar kommuna, J.nr. 2013-0024/15. Sambært hesi heimildarskipan tekur Havnanevndin avgerðir viðvíkjandi vørugjøldum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Vøruskráin fyri Tórshavnar havn er flokkað í ymsar vørubólkar. Hendan flokking hevur verið galdandi í fleiri áratíggjur.

Fyri vørubólk nr. 4604: “Spreingievni, dynamitt” er vørugjaldið 250 kr/tons. Hesi evni eru nevnd:

- Ammonium nitrat
- Dynamitt
- Dynamitt/spreingievni
- El-tennere til sprængning
- Sprængstof
- Spreingievni/dynamitt

Fyri vørubólk nr. 4901: “Taðevni, salpetur o.t.” er vørugjaldið 30 kr/tons. Hesi evni eru nevnd:

-  Gødning
-  Kalkkvælstof
-  Kompost
-  Nitrophoska
-  Pordbrugskalk
-  Salpeter
-  Salpter/taðevni o.t.
-  Taðevni/salpeter o.t.

Tórshavnar havn hevur eftirkannað innflutning av ammoniumnitrat og staðfest, at ammoniumnitrat higartil hevur verið flokkað í vørubólk 4604: “Spreingievni, dynamitt” (tó undantikið ein einstøk sending hjá B, sum av flutningsfelagnum, helst av misgáum, varð flokkað sum tøð). Tað er tískil ikki rætt, sum B førir fram, at fyritøkan ikki fær somu sømdir sum aðrar fyritøkur ella kappingarneytar, ið innflyta somu vøru.

Havnanevndin hevur samtykt at staðfesta avgerðina hjá Tórshavnar havn um at ammoniumnitrat framhaldandi verður flokkað í vørubólk 4604: “Spreingievni, dynamitt”. og tískil verður klagan afturvíst.”

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 2. mars 2023 varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis. Samstundis varð kommunan biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 23. mars 2023 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “... Eftir at hava spurt meg fyri hjá teimum, ið varða av innkrevjingini av vørugjaldi hjá Tórshavnar havn, og eftir at hava lisið skjølini í málinum, herundir skjølini í teimum báðum kærunum, ið felagið áður hevur sent inn og sum í báðum førum hava verið afturvístar, komi eg til somu niðurstøðu, sum bæði havnameistarin og havnanevndin áður eru komin til.
>
> Eg dugi ikki at síggja, í hvønn mun, Tórshavnar havn ger mismum og krevur annað vørugjald frá B fyri innflutning av Ammoniumnitrat enn frá øðrum innflytarum.
>
> Býráðið hevur ásett eina gjaldskrá fyri virksemið hjá Tórshavnar havn, har m.a. vørugjøld eru ásett. Í hesi gjaldskrá, sum seinast er regulerað í 2009, eru ásetingar um gjøld fyri teir ymisku bólkarnar, herundir spreingievnir, skotvápn v.m. Gjaldskráin er uppbygd eftir sama leisti sum gamla kunngerðin um havnagjøld, ið var avtikin fyri nógvum árum síðani, og takstirnir eru í stóran mun óbroyttir
>
> Tórshavnar havn hevur gjørt eina neyva flokking fyri tær ymisku vørurnar, sum koma til landið eftir hesari takstskipan. Tórshavnar havn hevur í nógv ár flokkað ammoniumnitrat

yvir 16% sum spreingievni, og allir innflytarar hava rindað vørugjald samsvarandi hesum. Harumframt skal viðmerkjast at ammoniumnitrat yvir 16% av myndugleikunum er flokkað sum spreingievni, og krevur serligt loyvi fyri at innflyta og selja.

Eg havi fingið upplýst frá Tórshavnar havn, at tað eru bert tveir innflytarar av Ammoniumnitrat umvegis bryggjukant hjá Tórshavnar havn, og hesir eru B og .... Báðar fyritøkur brúka Ammoniumnitrat í síni framleiðslu av spreingievni.

Tað eru ikki aðrar fyritøkur, ið innflyta "reint" Ammoniumnitrat, so tá ið hetta verður ført fram í skrivi tann 25. apríl 2022 frá sakførarunum hjá B til Tórshavnar havn, so er talan um viðurskifti, ið vit ikki hava kunnleika til.
Alt Ammoniumnitrat, sum verður flutt inn umvegis bryggjukant hjá Tórshavnar havn, kemur í vørugjaldsskránni undir vørubólk 4606 og rindar vørugjald eftir teimum takstum, ið eru ásettir í hesum vørubólki. Soleiðis hevur tað verið í nógv ár, sum víst er á omanfyri.

Tað eru fyritøkur, ella í hvussu er ein fyritøka, sum innflytur tøð umvegis Tórshavnar havn, og tað er .... Hesi tøðini eru tó liðugt blandaði, og talan er tískil ikki um somu vøru sum vøran Ammoniumnitrat, ið kemur undir vørubólk 4606. Taðevni koma undir vørubólk 4901 og rinda vørugjald eftir teimum takstum, ið eru ásettir í hesum vørubólki.

Vit hava sum sagt í fleiri umførum viðgjørt kærur frá B um hesi somu viðurskifti, men vit kunnu heldur ikki í sambandi við hesa viðgerðina sanna tað, ið ført verður fram í kæruni – at B er fyri mismuni samanborið við aðrar fyritøkur. Um B hava ítøkiliga vitan um fyritøkur, ið innflyta Ammoniumnitrat og sum rinda vørugjald eftir øðrum vørubólki enn 4601, so eru vit sjálvsagt fús at kanna hesi viðurskifti nærri.

Sum er, kunnu vit tó bert vísa á tær viðgerðir, ið áður eru farnar fram av kærum hesum viðvíkjandi og halda fast um tað, ið vit higartil hava víst á."

Tann 18. apríl 2023 sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu soljóðandi skriv:

"... Tit hava í hesum sambandi sent okkum gjaldskránna hjá Tórshavnar havn, har m.a. vørugjøld eru ásett.

Umboðsmaðurin ynskir í hesum sambandi at fáa frágreiðing frá tykkum um heimildina fyri gjaldskránni, hvørjum meginreglum gjøldini verða ásett eftir og hvar gjaldskráin er lýst.

Eisini ynskir umboðsmaðurin upplýst, hvønn myndugleika verður víst til, tá tað í frágreiðingini verður viðmerkt, at ammoniumnitrat yvir 16% verður av myndugleikunum flokkað sum spreingievni, og hvar hendan flokking er ásett ella sæst."

Tann 25. mai 2023 svaraði Tórshavnar kommuna:

"... Fram til apríl 2000 var grundarlagið undir vørugjøldunum hjá føroysku kommununum kunngerð nr. 112 frá 5. juli 1995 um skipa- og vørugjøld fyri havnir og bryggjur. Tann

kunngerðin hevði heimild í Lov nr. 7 af 30. januar 1875 om Udfærdigelse af reglementariske Bestemmelser for Benyttelse af Havne m.m.

Gjøldini í nevndu kunngerð vórðu ásett eins fyri allar kommunur, og broytt av Landstýrinum so hvørt kommunurnar bóðu um broytingar.

Nevnda kunngerð varð tó sett úr gildi í apríl 2000. Hetta var eftir at tað seint í 1999 varð lagt uppskot fyri Løgtingið um løgtingslóg um skipa- og vørugjøld[1]. Endamálið við hesi lóg var at samskipa øll skipa- og vørugjøld fyri allar kommunalar havnir og bryggjur.

Sambært nevnda lógaruppskoti skuldi landsstýrismaðurin hava heimild til at áseta nærri reglur um flokking av nevndu vørum og tænastum og støðd á teimum gjøldum, sum latast skuldu. Í serligu viðmerkingunum í tí lógaruppskotinum varð staðfest av landsstýrinum, at tað eru kommunurnar, sum eigarar av havnum og bryggjum, ið hava heimild til sjálvar at áseta tey gjøld, ið skulu latast fyri brúk av kommunalari havn og/ella bryggju.

Hesum var Vinnunevnd Løgtingsins samd í, men uppskotið fall kortini, tí undirtøka varð ikki í Løgtinginum fyri samskipaðum gjøldum fyri allar kommunur. Aðramáta var semja.

Í sínum áliti til málið, skrivar meirilutin í Vinnunevnd Løgtingsins soleiðis: ”*Merilutin í nevndini ... tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið. Meirilutin heldur, at tað er rættast, at tað eru kommunurnar sjálvar, sum áseta gjøldini, og vísir í hesum sambandi á, at broytingarnar, sum eru farnar fram á samferðsluøkinum hava havt við sær, at stórur partur av bæði út- og innflutninginum fer um nakrar fáar havnir, og merkir hetta, at tað verða havnir, sum als eingi vørugjøld fáa, og sum nú er, heldur ikki hava møguleika at luttaka í eini kapping. Sambært viðmerkingunum frá Kappingarráðnum er príssamskipan eisini eitt av teimum tiltøkum, sum verður mett at hava tað mest skaðiligu ávirkanina á kappingina í framleiðslu og handli av vørum og tænastum. Endamálið hjá landsstýrismanninum við at leggja hetta lógaruppskotið fram var sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið eisini bara at fáa eina greiðari lógarheimild.”*

Vit hava sostatt við eina støðu at gera, har lóggevari beinleiðis gevur til kennar, hvørja heimild kommunurnar metast hava á ávísum øki, og lóggevari heldur seg síðan aftur við at regulera.

Tá lógaruppskotið um skipa- og vørugjøld ikki varð samtykt, varð kunngerð nr. 112 frá 5. juli 1995 sett úr gildi í 2000.

Tórshavnar havn setti í 2002 nýggja vøru- og gjaldsskrá í gildi. Tvs. at kommunan hevur brúkt heimild sína til sjálv at áseta gjøldini**.** Tað skal tó viðmerkjast, at gjøldini í teirri gjaldsskrá, ið Tórshavnar havn setti í gildi 1. januar 2002 neyvt fylgdi teimum gjøldum og tí leisti, ið varð ásettur í kunngerðini frá 5. juli 1995 og sum uppkravt hevði verið eftir fram til hendan dag. Tað vil siga, at tað fyri so vítt ikki hendi nøkur broyting við teirri nýggju gjaldsskránni í mun til støðuna frammanundan.

[1] Løgtingsmál nr. 22/1999: Uppskot til løgtinglóg um skipa- og vørugjøld

Viðgerðin í Havnanevndini í 2001, tá ið nýggja gjaldskráin varð samtykt, er løgd við hesum telduposti. Seinni – í 2009 – eru smávegis broytingar gjørdar í gjaldskránni, og fekk hendan gildi frá 1. juli 2009.

Í Heimildarskipanini hjá Tórshavnar kommunu er ásett fyri Vinnunevndina hjá Tórshavnar býráð (sum, tá ið Heimildarskipanin varð samtykt, eisini var Havnanevnd), at umsitingin ger tilmæli í málum um vørugjøld á havnaøkinum, og at Vinnunevndin (Havnanevndin) tekur avgerð í slíkum málum. Sostatt er heimildin at áseta gjøldini í gjaldskránni latin frá býráðnum til Havnanevndina. Heimildarskipanin er løgd við hesum telduposti.

Eg veit ikki annað at siga um meginreglurnar, ið gjøldini verða ásett eftir, enn tað, ið stendur í sjálvari gjaldsskránni, har tað m.a. undir Almennu reglunum viðvíkjandi vørugjøldunum stendur, hvørjum vørugjald skal rindast av, og hvussu hetta verður roknað v.m.

Samanumtikið kann tó sigast, at gjøldini fyri innflutning av vørum framvegis fylgja leistinum, ið hevur verið galdandi seinastu nógvu árini og í hvussu er síðani 1995.

Viðv. spurninginum um, hvar gjøldini eru lýst, so eru hesi ikki lýst alment. Tey eru fráboðaði skipafeløgunum, sum krevja inn vørugjøldini fyri Tórshavnar havn, og fáa hesi eina samsýning frá Tórshavnar havn fyri at krevja vørugjøldini inn.

Viðvíkjandi spurninginum um, hvør myndugleiki hevur flokkað Ammoniumnitrat sum spreingievni, so er hesin spurningur ikki heilt einfaldur at svara. Orðingin stavar frá viðgerðini av hesum málinum, men eg eftirkannaði tíverri ikki viðurskiftini nóg væl, áðrenn eg endurtók hesa orðing í frágreiðingini til Umboðsmannin. Eg havi nevniliga ikki grundarlag fyri at staðfesta, at føroyskir myndugleikar flokka Ammoniumnitrat sum spreingievni, men eg havi heldur ikki grundarlag fyri at staðfesta, at teir ikki gera tað.

Tað finnast tó danskir og ES-myndugleikar, sum flokka í øllum førum ávís sløg av Ammoniumnitrat 16% sum “udgangsstoffer for eksplosiver”, og sum tað krevst serligt loyvi at keypa og handfara**. ...**

Løgtingslógin um spreingievni og spreingiarbeiði frá 30. apríl 2007 allýsir ikki, hvørji evni eru spreingievni, tó at kunngerð nr. 111 frá 17. juli 2019 um flutning av vandamiklum farmi á landi o.a., sum hevur heimild í nevndu lóg, í § 2 nr. 2 allýsir spreingievni sum: “Spreingievni o.a. fevnt av løgtingslóg um spreingievni og spreingiarbeiði v.m. – ADR flokkur 1.”

ADR er “Konvention om international transport af farligt gods ad vej”, og hevur nevnda konventión býtt ymisk evni upp í flokkar, har flokkur 1 er “Eksplosive stoffer og genstande”. Í Yvirlitinum yvir evni, ið eru býtt sundur í ávísu flokkarnar í ADR sæst, at “Amonniumnitrat” hevur nummar 0222 og hoyrir til flokk 1 – Eksplosive stoffer og genstande. Tað eru tó onnur evni, ið eisini innihalda ammoniumnitrat, ið eru flokkaði í aðrar flokkar í ADR.

> Samanumtikið hevur Tórshavnar havn søguliga flokkað Ammoniumnitrat í vørubólkin við spreingievni, skotvápnum v.m., og av tí at tað júst er til spreingievnisframleiðslu, klagarin innflytir Ammoniumnitrat hevur verið og verður framvegis hildið, at vørugjald skal rindast sum ásett í hesum vørubólki... "

Við skrivi, dagfest 25. mai 2023, vórðu viðmerkingarnar frá Tórshavnar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 7. juni 2023 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> «Ammonium nitrat er ikki spreingievni og verður heldur ikki klassifiserað sum spreingievni.
>
> B keypir ammonium nitrat frá Achema. Á heimasíðu teirra https://www.achema.lt/ammonium-nitrate-n34-4 verður greitt nærri frá ammonium nitrat, sum verður innflutt til Føroyar.
>
> Tað eru aðrar heimasíður, har tað verður greitt nærri frá ammonium nitrat, hvat tað er og hvat tað ger. ...
>
> Tað er gjøgnumgangandi, at ammonium nitrat er taðevni og ikki spreingievni.»

Tann 12. juni 2023 sendi umboðsmaðurin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum soljóðandi skriv:

> "Umboðsmaðurin viðgerð í løtuni eina klagu, sum snýr seg um vørugjald í sambandi við innflutning av ammonium nitrat.
>
> Ósemjan millum innflytaran og Tórshavnar Havn snýr seg um, hvørt innflytarin eigur at rinda vørugjald eftir satsinum fyri tøð (vørubólkur 4901) ella eftir satsinum fyri spreingievni (vørubólkur (4604).
>
> Okkara kunnleiki á hesum øki er avmarkaður. Við tað at Arbeiðs- og brunaeftilitið umsitur lóggávuna um spreingievni og spreingiarbeiði, verður spurt um, Arbeiðs- og brunaeftirlitið kann lata Løgtingsins umboðsmanni eina frágreiðing um, hvat er avgerðandi fyri nær ammonium nitrat verður mett, at koma undir reglurnar fyri spreingievni eftir tí lóggávu, ið tit umsita, og nær tað sostatt krevst serligt loyvið frá tykkum at innflyta ammonium nitrat."

Tann 7. juli 2023 sendi Arbeiðs – og brunaeftirlitið soljóðandi svar til umboðsmannin:

> "Sambært Løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 2007 um spreingievni og spreingiarbeiði v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, hevur Arbeiðs- og brunaeftirlitið eftirlit við og gevur loyvi til:
>
> 1. Innflutning av spreingievni, útbúnaði v.m. smb. §3, stk. 1
> 2. Framleiðslu av spreingievni smb, §4, stk. 1
> 3. Handfaring av spreingievni og útinnan av spreingiarbeiðið smb. §5, stk. 1
> 4. Marknaðarføring, keyp ella sølu av spreingievni v.m. og útbúnaði smb. §6, stk. 1

> Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur ikki eftirlit við ella gevur loyvi til innflutning av ammonium nitrat, olju ella øðrum serskildum rávørum, ið millum annað kunnu nýtast til framleiðslu av spreingievni. Arbeiðs- og brunaeftirlitið metir ikki, at hesar serskildu rávørur í sær sjálvum, eru at skilja sum spreingievni, og metir tískil heldur ikki, at tær eru fevndar av lógini um spreingievni og spreingiarbeiði.
>
> Tað er ikki fyrr enn viðkomandi rávørur, her undir ammonium nitrat, verða blandaðar saman við aðra rávøru eftir ávísum lutfalli, at talan verður um spreingievni, sum er fevnt av áðurnevndu lóggávu og harvið kemur undir myndugleikaøki hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum."

Við skrivi, dagfest 10. juli 2023, varð frágreiðingin frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum send pørtunum til kunningar og møguliga viðmerkingar við freist til 25. august 2023.

Tann 18. september 2023 sendi umboðsmaðurin pørtunum soljóðandi skriv:

> "Nú freistin at gera viðmerkingar til frágreiðingina frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum er farin og hvørgin av pørtunum hevur gjørt viðmerkingar, er umboðsmaðurin farin undir endaligu viðgerðina av málinum.
>
> Umboðsmaðurin ynskir í hesum sambandi at fáa neyvari upplýsingar um vøruflokkingina, ið Tórshavnar Havn hevur gjørt til bólkarnar í gjaldsskránni.
>
> Umboðsmaðurin fer í hesum sambandi at biðja Tórshavnar kommunu um at senda sær avrit av allari vøruflokkingini (vita hava bara avrit av bólki 4604 og 4901) og at fáa upplýst, um hetta er ein flokking, sum Tórshavnar Havn sjálv hevur gjørt, ella um hetta er við fyrimynd í flokking hjá øðrum myndugleika. Eisini ynskir umboðsmaðurin upplýst, um hendan vøruflokking eisini var nýtt, tá kunngerðin nr. 112 frá 5. juli 1995 um skipa- og vørugjøld fyri havnir og bryggjur var galdandi. ..."

Tann 21. september 2023 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum galdandi vøruskrá og vøruskránna frá 2002.

Tann 26. september 2023 spurdi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu, hvussu praksis hevði verið við vørugjaldi á ammonimnitrat, meðan gamla kunngerðin var í gildi, og um man tá eisini hevði eina vøruskrá afturat gjaldsskránni at umsita eftir, og í so fall, um hon hevði somu uppdeiling sum nú – serliga tá hugsað verður um ammoniumnitrat. Eisini spurdi umboðsmaðurin, hvør fyrimyndin var fyri vøruskránni hjá Tórshavnar Havn, og vísti m.a. á toll- og vøruskránna hjá Taks, kap. 31 nevnt gødningsstoffer og kap. 36 nevndur krudt og andre eksplosive stoffer, har ammoniumnitrat er nevnt undir kap. 31.

Tann 6. oktober 2023 svaraði Tórshavnar kommuna, at teirra elsta forrit til vørugjald hjá Tórshavnar havn við alias á teldu kom í 2002, og hevur Tórshavnar Havn tí ikki nakra teldutøka

vøruskrá eldri enn hesa við alias, og at teimum kunnugt er ammoniumnitrat blivið flokkað sum spreingievni í yvir 20 ár.

At stuðla undir sjónarmiðið um, at ammoniumnitrat kann flokkast í bólkin fyri spreingievni, varð frá Tórshavnar kommunu/Tórshavnar havn víst á, at í ávísum førum er ammoniumnitrat eisini flokkað sum spreingievni í tariferingini hjá Skat í Danmark. Víst varð til tekstin í tarifering undir pkt. 3602 *"tilberedte sprængstoffer undtaget krudt" (mín viðm.)*

> "En vare bestående af fritflydende porøst granulat hovedsageligt bestående af ammoniumnitrat og med følgende sammensætning...
> Tarifering under pos. 3102 "*kvælstofholdige gødningsstoffer, mineralske ellar kemiske" (mín viðm.)* er udelukket, da varen er specifikt sammensat til at blive anvendt som basismateriale til sprængstoffer. Hverken den anioniske polymer eller belægningen er teknisk relevant for brug til gødning. Betingelserne i bestemmelse 2 til kapitel 31 er derfor ikke opfyldt. Varen tariferes derfor under KN-kode 3602 00 00 som tilberedte sprængstoffer, undtagen krudt....*"*

Tann 23. oktober 2023 spurdi umboðsmaðurin klagaran um ammoniumnitratið, ið B innflytur, er tilgjørt til nýtslu sum spreingievni áðrenn innflutning.

Tann 14. november 2023 svaraðir klagarin:

> "Ammoniumnitrat, sum B innflytir í sekkjum ... er ganska vanligt og ófarligt taðevni (gjødningur). Hetta produkt er ikki gjørt ella viðgjørt til nýtslu til spreingievni, áðrenn tað verður innflutt. …
>
> B framleiðir spreingievni við einari kemiskari prosess við m.a. nýtslu av ammoniumnitrat, sum verður blandað saman við oljum. …"

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um, hvørt Tórshavnar havn hevur heimild at krevja vørugjald fyri innflutningi av ammoniumnitrat (yvir 16%) eftir takstinum fyri bólk 4604, nevndur "Spreingievni, dynamitt" í vøruskránni, sum er partur av gjaldskránni fyri Tórshavnar havn.

Avgerðin hjá Tórshavnar havn, at krevja vørugjald av innflutningi av ammoniumnitrat eftir takstinum í 4604, er staðfest av Havnanevndini hjá Tórshavnar kommunu. Havnanevndin er hægsti myndugleiki í mun til áseting av stødd av vørugjøldum og er eisini kærumyndugleiki í mun til kærur um Tórshavnar havn.

<u>Lógir og reglur fyri vørugjald</u>
Galdandi gjaldskrá, sum Tórshavnar býráð hevur gjørt fyri Tórshavnar havn, er dagfest 1. juli 2009. Afturat gjaldskránni er galdandi ein vøruskrá frá 2002, sum Tórshavnar havn hevur gjørt til neyvari flokking av bólkunum í gjaldsskránni. Gjaldskráin og vøruskráin eru ikki alment lýstar, men fráboðaðar skipafeløgunum, sum krevja inn vørugjøld fyri Tórshavnar havn.

Reglur um havnir og Kommunufulltrúin

Í Føroyum er ikki nøkur havnalóg ella onnur lóggáva sum ásetur grundleggjandi treytirnar fyri, hvussu eitt nú kommunalar havnir skulu/kunnu skipast og rekast, sí tó niðanfyri um lov nr. 127 af 29. april 1913 om anlæg av havne m.v. paa Færøerne, sum m.a. var heimildin fyri at gera eina havn í Tórshavn og seinni at yvirtaka havnina sum kommunala havn og lov nr. 7 af 30. januar 1875 om Udfærdigelse af reglementariske Bestemmelser for Benyttelse af Havne m.m., sum er ein heimildarlóg fyri skilhaldsreglum á m.a. havnum.

Sum Tórshavnar kommuna hevur greitt frá, liggur grundarlagið fyri heimildini hjá kommununi tí í hesum føri í sjálvari kommunufulltrúini. Sambært kommunufulltrúini kann ein kommuna uttan ítøkiliga lógarheimild fara undir ymisk tiltøk av fíggjarligum slagi á staðnum, tó hava kommunur ikki loyvi at reka vinnuvirksemi, uttan at hetta er heimilað í lóg, og uppríkan av kommununi er ólóglig.

Tey tiltøk av fíggjarligum slag, sum kommunan kann gera við heimild í kommunufulltrúini, snúgva seg serliga um at veita borgarunum ymisk sløg av tænastum og eisini at krevja gjald fyri hesar tænastur. Gjaldið fyri eina tænastu má tó altíð ásetast við virðing av meginregluni um, at uppríkan av kommununi er ólóglig, tí kommunurnar hava ikki til uppgávu at vinna pengar.

Tórshavnar havn og vørugjøld

Tórshavnar havn er skipað undir kommunustjóranum sum ein eind, har ein havnarmeistari er leiðari. Í § 2 í lov nr. 127 af 29. april 1913 om anlæg av havne m.v. paa Færøerne, som senest ændret ved lov nr. 125 af 15. juni 1927, er m.a. ásett soleiðis: ”Havnenes (molernes) indtægter og udgifter skal holdes adskilte fra kommunernes almindelige kasser; deres midler kan kun anvendes til bedste for dem selv”. Samsvarandi hesum inngongur Tórshavnar havn sum rakstrarstað í roknskapinum hjá kommununi.

Heimasíðan hjá Tórshavnar kommunu lýsir virksemið hjá Tórshavnar havn soleiðis:

> “ Tórshavnar havn umsitur øll havnaløgini í Tórshavnar kommunu. Hetta fevnir um alt frá farmahavnini í Tórshavn til bátaplássini á bygdunum í Tórshavnar kommunu.
>
> Í høvuðsheitum er virksemið á havnaøkjunum í allari kommununi farma- og ferðafólkaflutningur innan- og uttanlands, upp- og avskipan, umvælingar, proviantering og bunkring. Virksemið hjá Tórshavnar havn fevnir um so at siga alt, sum hevur við sjóvinnu at gera....”

At gera og reka eina havn hevur verið mett sum ein natúrlig kommunal uppgáva. Kommunan hevur heimild at krevja gjald fyri tær tænastur, sum verða veittar í sambandi við havnavirksemið. Tá kommunan, ikki uttan lógarheimild, hevur heimild at reka havnir á vinnuligum grundarlagi, kunnu gjøldini fyri tænastuna ikki vera við vinningi fyri eyga. Gjøldini eiga tí at avspegla útreiðslurnar, sum havnin hevur av tí ítøkiligu tænastuni. Hesir aðaltáttir eru eisini galdandi, tá vørugjøld skulu ásetast.

Eg haldi, at meginreglur um prísáseting ella ein kostnaðarpolitikkur eiga at verða skrivaðar í gjaldsskránni, so greitt er, hvørjir karmar eru fyri áseting av vørugjøldum.

Líkareglan
Klagarin hevur gjørt galdandi, at meginreglan um, at borgarar skulu viðgerast eins og fáa somu sømdir (líkareglan), verður sett til viks av Tórshavnar havn, tá tað snýr seg um innflutning av ammoniumnitrat. Tórshavnar kommuna hevur undir málsupplýsingini víst aftur, at Tórshavnar havn ger mismun og krevur annað vørugjald frá klagaranum fyri innflutning av ammoniumnitrat enn frá øðrum, sum innflyta somu vøru. Víst verður í hesum sambandi á, at øll, sum innflyta ammoniumnitrat yvir 16%, rinda gjald eftir flokkingini fyri spreingievnið. Tey, sum innflyta tøð, har ammoniumnitrat er í tøðblandingini, rinda vørugjald eftir flokkingini fyri tøð, tí talan er tá um eina aðra vøru.

Tá tøð, har ammoniumnitrat er íblandað og ammoniumnitrat yvir 16%, eru ymiskar vørur, og tá allir innflytarar av ammoniumnitrat yvir 16% verða viðgjørdir líka, haldi eg, at grundarlag er ikki fyri at siga, at Tórshavnar Havn ger beinleiðis mismun á innflytarum.

Gjaldsskráin fyri Tórshavnar havn og vøruskráin
Almennu reglurnar, sum í gjaldsskránni eru ásettar fyri vørugjald, síggjast undir yvirskriftini II Vørugjald Pkt. A, 1 har ásett er, at vørugjaldið verður roknað eftir tí vekt, tí máti o.s.fr., sum er tilskilað í skipsskjølunum, soleiðis at farið verður eftir bruttovektini.

Í almennu reglunum er eisini ásett, at Tórshavnar havn flokkar tær ymsu vørurnar, sum koma til landið, eftir takstaskipanini í gjaldskránni, og kann ein vøra verða roknað til ymsar takstir, eigur at verða valt tað gjaldið, ið er best fyri gjaldaran. Møguligar kærur um flokking skulu sendast havnastýrinum (nú Havnanevndini).

Í gjaldsskránni er tó einki ásett um, hvørjar meginreglur ella atlit eru galdandi fyri sjálva prísásetingina, ella hvørji atlit annars kunnu ávirkað gjaldið, t.d. um vørur, sum viðføra krøv um serliga handfaring og trygd, skulu hava hægri gjald o.s.v.

Sum viðurskiftini við vørugjaldi eru lýst í sambandi við hesa klaguna, haldi eg, at tað er ov lítið gjøgnumskygni um grundarlagið fyri ásetingini av takstunum í gjaldskránni.

Í gjaldsskránni, sum Tórshavnar býráðið hevur gjørt, er bólkur 46 nevndur Spreingievni, skotvápn v.m. Í bólki 46 er ein undirbólkur nevndur a) patrónir, spreingievni, dynamitt, svávulpinnar o.t. Vørugjaldið fyri vørur í hesum bólki er 25 kr. pr. 100 kg.

Í vøruskránni, sum Tórshavnar havn hevur gjørt, sum er ein neyvari flokking av bólkunum í gjaldsskránni, er ein bólkur undir 46 nevndur 4604 spreingievni, dynamitt. Eitt av evnunum nevnd undir hesi bólking er ammoniumnitrat, og sum skilst av málsupplýsingunum, er tá talan

um ammoniumnitrat yvir 16%. Tórshavnar kommuna hevur víst á, at hendan flokking hevur verið ásett og praktiserað allatíðina, meðan býráðið hevur havt heimild at áseta gjøldini.

Av málsupplýsingunum sýnist tó greitt, at ammoniumnitrat, sum klagarin innflytur, í sjálvum sær ikki er spreingievni.

Hetta hevur klagarin víst á, eins og Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevur víst á hetta í frágreiðingini til mín. Klagarin hevur harumframt víst á, at ammoniumnitrati, sum klagarin innflytur, ei heldur er gjørt ella viðgjørt til nýtslu til spreingievni, áðrenn tað verður innflutt.

Eisini er greitt, at tá ammoniumnitrat verður innflutt sum partur av eini tøð blanding, so verður vøran bólkað í bólk 49, nevnt taðevni, har vørugjaldið er 3 kr. pr. 100 kg.

Eg havi ikki fingið nakra ítøkiliga grundgeving fyri, hví ammoniumnitrat sum innflutt vøra er flokkað undir vørubólkin 4604 "spreingievni, dynamitt". Frágreiðingarnar frá Tórshavnar kommunu og málsskjølini benda á, at Tórshavnar havn og Havnanevndin hava havt tí fatan, at talan er um spreingievni, og at tað krevst serligt loyvi at innflyta hesa vøru, og at tað eisini er tikið atlit at, at klagarin nýtir innfluttu vøruna til framleiðslu av spreingievni.

Um hetta er grundarlagið fyri flokkingini, tykist flokkingin at byggja á eina misfatan og ivasom atlit.

Eg havi tó ikki førleika at siga, júst í hvønn bólk í gjaldsskránni tað er rættast at flokka ammoniumnitrat í, men kann vísa á, at í galdandi Toll- og vøruskrá hjá TAKS er ammoniumnitrat bólkað undir kap. 31 nevndur gødningsstoffer. Eisini skal eg, sum frammanundan nevnt, vísa á, at heimildin til at áseta vørugjøld er avmarkað av regluni um, at kommunalt virksemi ikki kann rekast við vinningi fyri eyga uttan serskilda lógarheimild, og at vørugjøldini eiga at avspegla útreiðslurnar, sum havnin hevur av tí ítøkiligu tænastuni.

Havnanevndin er myndugleikin, ið ásetur vørugjaldið. Við at staðfesta avgerðina hjá Tórshavnar havn í hesum máli hevur Havnanevndin góðkent, at flokkingin, sum Tórshavnar havn hevur gjørt av ammoniumnitrat í 4604, er innan karmin av bólki 46 í gjaldskránni. Hóast ivasama grundarlagið fyri at flokka ammoniumnitrat undir bólk 4604 í vøruskránni "spreingievni, dynamitt" og harvið í flokk 46 í gjaldskránni nevndur "spreingievni, skotvápn v.m." havi eg sostatt ikki grundarlag at staðfesta, at kravda vørugjaldið av innflutninginum av ammoniumnitrat er beinleiðis skeivt.

Vísandi til frágreiðingina frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum um, at ammoniumnitat sum rávøra í sær sjálvum ikki er at skilja sum spreingievni, og at tað er ikki fyrr enn at ammoniumnitrat verður blandað saman við aðrari rávøru, at talan verður um spreingievni, fari eg at mæla Tórshavnar kommunu (Havnanevndini) til at endurskoða gjaldsskránna og vøruskránna við atliti at vørugjaldinum fyri ammoniumnitrati.

Eg fari eisini at mæla til at gjaldskráin og vøruskráin verða lýstar soleiðis, at tær verða alment atkomuligar.

Eg fari at biðja Tórshavnar kommunu / Havnanevndina lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður